# Bønar- og tíðindabræv frá Halli, Shino og Kano Mortensen

*Ankpa, Nigeria, august 2011*

**Kæru náðisyskin har heima**

Nú er summarið farið aftur um bak, og skúlin er byrjaður aftur við nógvum nýggjum næmingum.
Nógv er broytt, síðani eg skrivaði seinast. Fyri tað fyrsta eri eg nú einsamallur eftir í Nigeria, nú Shino og Kano eru farnar til Japan, har Shino er sett til at eiga fyrst í oktober. Tað var ein strævin ferð, men alt gekk væl. Gott var, at tær kundi fylgjast við míni familju, sum í summar hevur vitjað okkum í Nigeria.
Tó at tað ikki er tað besta at vera so langt frá hvør øðrum hesa tíðina, er tað gott, at hon kann fara heim, tí umstøðurnar her eru ikki so góðar, serliga um okkurt er áfatt. Gott er eisini, at familjan hjá Shino kann vera tætt hjá teir fyrstu mánaðirnar. Ætlanin var, at eg skuldi fara til Japan í desember, men tíbetur hava vit fingið hetta broytt til, at eg kann fara fyrst í oktober og vóni so at vera fyrr enn barnið.
Ætlanin er so, at vit øll koma aftur til Nigeria um miðjan januar. Eg havi fingið eina serliga avtalu í lag við skúlan, so til ber at undirvísa frá august til oktober.

## Vatn

Higartil hevur eitt av tí strævnasta við at búgva her verið, at vit mugu sjálv fara inn í býin eftir vatni. Men leingi hevur verið arbeitt við at gera ein brunn á skúlaøkinum, har vit kunnu fáa reint vatn. Nú er tað so endiliga komið so langt, at vatn kann pumpast upp og berast inn í húsini. Næsta stig verður so at byggja eitt vatntorn og leggja rør til húsini, so vit fáa rennandi vatn inni. Hetta er sjálvandi ikki bara gott fyri okkum, men eisini fyri næmingarnar og aðrar familjur, sum búgva her. Tað fer at gera tað dagliga lívið eitt sindur lættari, sum er gott fyri trivnaðin, sum so eisini er gott fyri arbeiðið.

## Ahmadu Bello University

Skúlin hevur verið í eini langari tilgongd at fáa tilknýti til ein av lærdu háskúlunum í landinum. Nú hevur tað endiliga borið til, og longu næsta ár fara nøkur prógv at koma frá Ahmadu Bello University of Zaria.
Ætlanin er, at okkara gudfrøðiliga bachelor útbúgving eisini skal fáa prógv frá ABU. Hetta hevur nógvar fyrimunir, bæði fyri skúlan og næmingarnar. Eitt er sjálvandi, at skeiðini, sum tikin verða á PACT (Peter Achimugu College of Theology) fáa størri virðing um alt landið, serliga í øðrum landslutum, har tey ikki kenna til okkara lítla skúla. Annað er, at tað verður lættari at fáa arbeiði við hesum prógvinum, bæði í øðrum samkomum og til kristniundirvísing í fólkaskúlanum og miðnámsskúlum. Vónandi fer hetta eisini at økja um næmingatalið, sum so eisini bøtir um fíggjarkarmanar hjá skúlanum, umframt at størri íløgur kunnu gerast í bókasavnið, skúlastovurnar o.a.

## Undirvísing

Áðrenn vit komu til Nigeria, hevði eg spurt um, hvørjar lærigreinar eg mundi fara at undirvísa í, so eg kundi gera mær nakrar tankar um, hvussu eg skuldi fyrireika meg. Eg fekk tey góðu ráð, at eg mátti bara vera liðiligur. Í farnu viku, ein dag eftir at skúlin var byrjaður aftur eftir summarsteðgin, fekk eg eina eyka lærigrein tveitta í føvningin, sum eg skuldi byrja at undirvísa í dagin eftir, og sum eg ikki hevði undirvíst í áður. Eg kundi ikki tala ímóti, tí eg var ikki tann einasti, og so var bara at royna sum best at fyrireika undirvísingina.



*Takkið Harranum fyri*
- at ferðin hjá Shino og Kano til Japan gekk væl
- at vit hava fingið ein vatnbrunn á skúlaøkið
- at skúlin hevur fingið tilknýti til ABU
- at eg kann fara til Japan fyrst í oktober

*Biðið fyri*
- hesum undirvísingarskeiðnum
- at samstarvið við ABU verður ríkt og gott fyri báðar partar
- barnsburðinum hjá Shino, at alt skal ganga væl

Harrin signi tykkum øll.

Vónandi hoyra tit skjótt frá okkum aftur.

*Hallur, Shino og Kano Mortensen*







